# B36 VERÐUR MEISTARI Á MIKKJALSMESSU



**Botnliðini eru longri frá bjargingini, og í toppinum er tað nú bara HB, sum vísti rimmar avrik, ið hevur møguleika at taka grannarnar, sum ivaleyst vinna FM, áðrenn september verður liðugur**

Jóannes Hansen

Átta umfør eru eftir av 2014 landskappingini. Í gjár vunnu bæði toppliðini, meðan næsti avbjóðarin, sum er Víkingur, á heimavølli var partur av javnleikni. Í botninum taptu bæði botnliðini. Tey trý omanfyri strikuna vunnu øll eitt stig.

Broytingin í støðutalvuni eftir hetta umfarið er, at tað er longri frá Víkingi á triðja plássi og fram til HB og B36, enn tað var undan hesum umfarinum, og at tað er longri frá B68 og Skála fram til AB, ÍF og KÍ, enn tað var undan hesum umfarinum.

Átta umfør eru eftir. Mikukvøldið og sunnudagin verður B36 favorittur á útivølli ímóti AB og á heimavølli ímóti KÍ. Um tað eydnast hesar báðar ferðirnar at vinna fulla úrtøku, so verður sannlíkið sera stórt fyri, at B36 fer at hava tryggjað sær FM heitið, áðrenn september mánaður verður liðugur. 28. september ella dagin fyri mikkjalsmessu skal B36 spæla í Fuglafirði, og tá kann tað fara at vísa seg, at FM verður í viðføninum á veg suður aftur.

HB hongur í, og framúr avrikið og trivaligi sigurin við Margáir í gjár var staðfesting av, at meistararnir liggja framvið og eru klárir at taka um endan, um grannarnir skuldu kiksa. Í løtuni bendir einki á, at tað skal fara tann vegin. Heldur verður tað sannførandi gull til B36 og eins sannførandi silvur til HB.

## Skála stressaði toppin

B36 vann 2-0 heimasigur á Skála. Úrslitið var nett tað sama, sum tað var í 1. umfari, tá ið somu liðini spældu á sama vølli. Tá ið liðini hittust á Skála, vann B36 3-0. Harvið er samantalda úrtøkan 9 stig og 7-0 málmunur B36 til fyrimunar.

Hesa ferð var Andrias Eriksen aftur í B36 miðverjuni, eftir at hann leingi hevur verið uttanfyri orsaka av skaða. Klæmint Matras var burturstaddur, og Odmar Færø var fluttur úr miðverjuni og fram á verjukent sentralt miðvallarpláss.

Í gjár gjørdu skálamenn sjálvmál í 1. hálvleiki. Kortini var spenningur í, inntil tíðin var um at vera farin. Tá staðfesti Lukasz Cieslewicz eftir skjótt uppspæl og sending frá Adeshina Lawal.

- Vit løgdu meiri í álopspartin sum 2. hálvleikur leið, og tað kostaði í síðstu løtu. Í 1. hálvleiki var tætt við, at Brian Jacobsen javnaði, tá ið hann úr 30 metrum sendi ímóti málinum, og Tórður Thomsen bjargaði umvegis tvørtræið og til horna. Tá ið bólturin so varð lagdur innfyri aftur, stórbjargaði Tórður. Hjá okkum ræður um at blíva við at trúgva upp á tað. Vit kunnu gera so nógv annað. So fáa vit at síggja, hvør úrtøkan verður, var viðmerkingin hjá Skála miðverjanum Pæturi Dam Jacobsen.

B36 málverjin Tórður Thomsen var væl nøgdur við, at tað eydnaðist at vinna:

- Hóast eg var arbeiðsleysur í 2. hálvleiki, so var tað strevið so leingi støðan var 1-0. Vit fokusera á ein dyst í senn. Úrslitið hjá HB í torføra útidystinum í gjár vísti, at vit fáa neyvan hjálp frá nøkrum øðrum, staðfesti B36 málverjin.

## Víkingur fær ov lítið burturúr

Eftir summarsteðgin og óføra avrikið í europeisku kappingini hevur úrtøkan hjá Víkingi verið minni enn hjá feløgunum í Gundadali. Í gjár var úrslitið á heimavølli ímóti AB 2-2. Harvið er møguleikin fyri at vinna meiri enn bronsu í landskappingini fánaður nógv.

- Fýra tær seinastu ferðirnar hevur úrslitið í landskappingini verið javnleikur. Felags fyri allar hesar dystirnar hevur verið, at vit hava verið leikliga omaná. Finnur Justinussen er størsti garanturin fyri málunum hjá okkum. Tá ið tað ikki eydnast hjá honum, er tað torførari, og vit skulu arbeiða meiri fyri at skora. Vit hava havt møguleikar, uttan at tað er eydnast. Ímóti AB høvdu vit tríggjar góðar møguleikar at skora, áðrenn teir skoraðu fyrra málið, og Hanus Jacobsen hevði risa møguleika at javna, áðrenn Kári Nielsen við langskoti økti um AB leiðsluna til 2-0. Tíbetur minkaði Philip Djordjevic um munin til 2-1 stutt undan steðginum. Miðvallarin Heðin Hansen javnaði til 2-2, og síðstu løtuna høvdu vit fleiri góðar støður at skora sigursmálið, men tað eydnaðist ikki. Vit eru ikki nóg agressivir í brotsteiginum, staðfesti Víkinga venjarin Sigfríður Clementsen.

AB málverjin Heðin Stenberg er fegin um, at tað við javnleikinum eydnaðist at sleppa uppaftur longri burtur frá botnplássunum:

Hetta var kærkomið stig. Síðani 3-0 tapið á heimavølli ímóti Víkingi hava vit nú spælt sjey dystir uttan at tapa. Tað eru vit nøgdir við. Síðstu løtuna vóru vit kroystir. Tað var tungt, og orkan gekk undan, men tíbetur royndust teir, sum komu á vøllin, væl. At teir javnaðu bara nøkur sekund undan steðginum hevði stóran týdning fyri gongdina í 2. hálvleiki, er metingin hjá Heðini Stenberg, sum fegnast um, at nýggi álopsspælarin Aleksandrs Cekulajevs skoraði fyrra málið:

- Hann hevur fín evni, og hann arbeiðir væl og nógv. Lítið man vera at ivast í, at hann fer at skora fleiri mál.

## Fyrsta lítla løtan avgerandi

NSÍ lyfti seg nærri fjórða plássinum og harvið europeiska atgongumerkinum við 3-1 heimasigri á B68.

Tá ið seks minuttir vóru farnir, var støðan 2-0, og tað var avgerandi fyri, at øll stigini vóru verandi við Løkin:

- Vit vóru ikki nóg væl við fyrstu lítlu løtuna, og tað kostaði tvey mál. Vit reistu okkum, og í 1. hálvleiki høvdu vit tríggjar stórar møguleikar at skora, uttan at tað eydnaðist. Eftir steðgin sótu vit fult og heilt á spælinum, men vit vunnu bara málið, sum Jóhan Dávur Højgaard skoraði. Hugburðurin var góður, men fyrsta løtan var avgerandi, staðfestir B68 venjarin Jógvan Martin Olsen.

NSÍ venjarin Trygvi Mortensen er væl nøgdur við úrslitið. At B68 í 2. hálvleiki sá út til at vera omaná, hevði NSÍ venjarin hesa viðmerkingina til:

- Í steðginum avráddu vit ikki at leggja so nógv fyri í 2. hálvleiki, men vit duttu

**FJEPPARA SMS**



**Kristian Joensen**
KÍ-FJEPPARI

*Nú byrjar at líkjast seinasta kappingarárið. Vit hava ikki vunnið í 5 dystir á rað. Kom nú KÍ, nú taka vit LÍF mikdagin*

**FJEPPARA SMS**



**Jóannes Niclasen**
B36-FJEPPARI

*dreingir hattar kunnu tit gera betur ok 3 stig er 3 stig um vit skulu gera nakad vid AB so sskulu bollar sum knettir i suppuna minnist til ein fyri allar allir fyri ein HVITIR*

**FJEPPARA SMS**



**Rúni Klein Joensen**
VÍKINGA-FJEPPARI

*Vindurin í Gøtu gjørdi sítt til at spæli var tilfeldugt at kalla allan dystin. Vit hava klára okkum væl í europa, men tað sær ikki út til at bera frukt í heimligu kappingini, 3 stig av seinastu 9 møguligu er ikki gott nokk, tað eru ov nógvir leikarir sum ikki raka dagin, tí vinna vit ikki fótbóltsdystir. Vit mugu bara vinna steypafinaluna og halda 3 plássi soleiðis at árið verður nøkulunda. WLYV*

**FJEPPARA SMS**



**Steingrím Jacobsen**
SKÁLA-FJEPPARI

*Nú má man bara hugsa um ein dyst í senn, og so síggja hvussu tað fer at ganga! Onki er avgjørt enn...*

**FJEPPARA SMS**



**Bárður Olsen**
AB-FJEPPARI

*Tað var ein rótutur dystur í dag, sum var tarnaður av nógvum vindi. Sama sum var fyrsta dystin hjá okkum í gøtu í ár, haldi ikki vit eru serliga vælkomnir har Víkingur vísir fínt spæl til tíðir, men vit kempa væl og skora uppá okkara møguleikar. Seinna hálvleik eru hevur Víkingur so at siga alt spæli vit eru nógv pressaðir. Víkingur kemur til nógvar møguleikar og fáa javna til 2-2 AB´arnir vísa vilja og stríðast fyri lívi til síðsta brígsl so liggur teirra partur ikki eftur soo 1 stig er 1 stig so vit eru nøgd við tað*